# Tunnilsekspressini«





Saman við Álvi vitjaðu nøkur av okkum blíð fólk í Klaksvík, áðrenn leiðin bar norður til Viðareiðis



Nógv fólk, motorsúklur og bilar vóru við bygdarhúsið í Leirvík. Fólk vóru spent, og lagið var gott

Á veg norðureftir vitjaðu vit hjá Ann og Sámali í Hósvík






.. og so fara vit inn á Hotel Norð at fáa okkum ein góðan bita

vøkru náttúruni í Gásadali í baksýni.

Fyrstur at vera avmyndaður var ábyrgdarblaðstjórin sjálvur – og hin seinasti var Páll á Reynatúgvu!

Vit fara ikki at avdúka her, hvørji svarini til spurningarnar hjá okkum vóru, men tey munnu fara at koma í Sosialin so við og við...

Nógv fólk var í Gásadali hesa løtu. Ein hópur av børnum, sum vóru komin í Vágar á dansistevnu, dansaðu føroyskan dans, meðan vit steðgaðu.

Okkara blaðmaður í farloyvi, Edvard í Skorini, sum nú er kunningarleiðari í Vágum, var mitt í øllum í rokanum.

Á ferðini norðuryvir steðgaði ”Tunnilsekspressin” í túninum hjá Ann og manninum, Sámali Christiansen, í Hósvík. Ann hevur sitið á skrivstovuni hjá Sosialinum ein hálvan mansaldur, og her situr hon framvegis.

Hjúnini hugnaðu sær í túninum omanfyri húsini, nú sólin var komin upp á luftina, og rættiliga lýtt var í veðrinum.

Í túninum høvdu tey havaborð og stólar – og grillin var tendrað til ein góðan bita.

Ann og Sámal vóru blíð, og fólk fingu tað, tey vildu hava. Eingin var svangur, men kanska var onkur eitt sindur tystur... oman á góða smyrjibreyðið, vit høvdu etið í Gásadali.

Úr Hósvík bar leiðin norðuryvir, og næsta »stopp« hjá non-stopp ekspressini, var uppi við bygdarhúsið í Leirvík, har hópur av fólki var samankomið, meðan bíðað varð eftir, at Norðoyatunnilin skuldi lata upp alment.

Ellisakfør við prominentum persónum og øðrum og motorsúklur í hópatali settu sín serstaka dám á hesa løtu.

Leirvíkingar vóru blíðir og bjóðaðu góða og vælsmakkandi fiskasuppu í bygdarhúsinum.

Lagið var gott, bæði á meirilutanum og minnilutanum í Leirvíkar bygdaráð, og eingin tosaði um togan og ósemjur – hvørki innanhýsis í Leirvík ella við landsins myndugleikar.

Vit, sum vóru við í »Tunnilsekspressini«, fingu at vita frá ábyrgdarblaðstjóranum, at vit fóru at teljast millum fyrstu bilarnar, sum sluppu ígjøgnum Norðoyatunnilin, tá ið tann løtan kom.

Blaðstjórin er kendur sum optimistur, og tað er – sum oftast – ein góður eginleiki at hava sum blaðstjóri.

Tá ið samanum kom, endaði »Tunnilsekspressin« – non stop - í eini langari bilrøð heilt úti á Vík í Leirvík, har vit bíðaðu í ein tíma ella meira, áðrenn vit sluppu heimeftir aftur og niður í dýpið undir Leirvíksfirði.

Eingin keddi seg, meðan vit bíðaðu...

### Endaðu á Viðareiði

Tað var eitt stórt upplivilsi fyrstu ferð at koyra gjøgnum Norðoyatunnilin, og ferðin undir havbotninum gekk bæði skjótt og væl.

Ferðin hjá ”Tunnilsekspressini” endaði fyribils hendan hátíðardag á Viðareiði, har vit fingu góðan døgurða á Hotel Norð.

Kanska var døgurðin eitt sindur kólnaður, tá ið vit komu norður, men tað gjørdi minni, tí veðrið var so gott...

Nú høvdu vit koyrt ígjøgnum tilsamans átta tunlar og hvørja ferð, vit stóðu við ein tunnilsmunna, var ábyrgdarblaðstjórin úti á vegnum við myndatólinum.

Vit steðgaðu á Viðareiði í nakar tímar, har vit prátaðu og hugnaðu okkum saman.

Hetta var ein deilig og avslappandi løta.

Um 23-tíðina bar leiðin aftur til Klaksvíkar, har vit at enda steðgaðu, meðan fýrverk um midnáttarleitið lýsti alla Klaksvíkina upp.

Neyvan nakrantíð áður man so nógv fólk hava verið úti á gøtuni í miðbýnum í Klaksvík samstundis.

Tá ið hendan løtan var liðug, var okkara frálíka ferð úr Vágsbotni, vestur í Vágar og norður til Viðareiðis, eisini liðug á hesum sinni.